# Kjak



**Erik Ludvigsen**
*Klosterjordet 6*
*Aalborg*

## Åbent brev

Til min store overraskelse har man afvist at offentliggøre mit indlæg om det fremsatte lovforslag til en ny færøsk forfatning med den begrundelse, at indlæget er skrevet på dansk og ikke på færøsk. Jeg har færøsk studentereksamen og kan godt til husbehov magte det færøske skriftsprog, men skal de nødvendige nuancer og den nødvendige slagkraft til, er det naturligt at bruge det sprog, man betjener sig af i det daglige.

Jeg har forstået, at det er bladets ledelse, der er mester for denne restriktion, der forekommer mig ganske meningsløs, men retligt set ikke er i strid med ytringsfriheden. Dog må man med rette hævde, at det snerper i retning af at lade hånt om ytringsfriheden rent faktisk.

SOSIALURIN, der ikke er hoppet i Dimmalættings gryde, har indvilget i at bringe mit indlæg om lovforslaget til ny færøsk forfatning og tak for det.

PS: Hvis Dimmalætting afviser dette ÅBNE BREV hører alting op.

# Jóannes Eidesgaard fremur valdsmisnýtslu

*Velir flokskammeratar í almennan grunn við feitari løn*

Miðflokkurin átalar skeivu framferðina hjá landsstýrismanninum við fíggjarmálum, nú hann í úrtíð hevur skift tveir nevndarlimir í Húsalánsgrunninum út.

Landsstýrismaðurin sigur orsøkina vera, at vrakaðu nevndarlimirnir ikki eru politiskt samdir við honum um, hvussu Húsalánsgrunnurin eigur at skipast í framtíðini. At ein landsstýrismaður sigur fólki í almennum álitisstørvum upp, tí tey eru ósamd politiskt, og síðani setir partísoldatar í sessirnar í staðin, samstundis sum hann fleirfaldar teirra samsýning, er onki minni enn álvarslig valdsmisnýtsla av hægstu rók. Framferð landsstýrismansins gongur ímóti demokratiskum kjarnuvirðum sum talu- og skrivifrælsi.

Tað er ósakligt og ímóti øllum fyrisitingarligum reglum at geva fólki í almennum sessum fótin, tí tey politiskt eru ósamd við avvarandi landsstýrismann. Og tað er enn meiri ósakligt og gongur enn meiri ímóti øllum meginreglum um góða fyrisiting, at formaður Javnaðarfloksins velur tveir floksfelagar í fjálgu almennu sessirnar í staðin. Og meðan pensjónistar enn eina ferð verða hart raktir av almennum sparingum, meðan børn við serligum tørvi og skúlabørn sum heild verða rakt av sparingum á skúlaøkinum, meðan verkafólk í stórum tali framvegis ganga arbeiðsleys, avger landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum eisini er formaður Javnaðarfloksins, at almenna samsýningin hjá nývaldu partísoldátunum skal fleirfaldast í mun til frammanundan.

Tingmanning Miðfloksins kann ikki góðtaka, at Jóannes Eidesgaard á hendan hátt misnýtir sín landsstýrissess til at reka partapolitikk við almennum starvssetanum, og fer tí at heita á landsstýrismálanevndina um at kanna allar lutir í hesum máli.

*Vegna Miðflokkin*
**Karsten Hansen**
**Bill Justinussen**
**Jenis av Rana**

---



**Sámal Matras Kristiansen**
*samfelagsfrøðingur*

# Misvísandi yvirskriftapolitikkur í Kringvarpinum (og øðrum miðlum)

Eg mundi fingið kaffið skeivt í hálsin, tá eg trýsti meg inn á kringvarp.fo í morgun (1. juni 2010). "1000 krabbameinssjúklingar kundu verið bjargaðir" stóð at lesa. Halga trý, hvussu kann tað passa? Tað doyggja ikki so nógv fólk í Føroyum árliga, so hatta eru kanska søgulig tøl fyri seinastu 20-30 árini, hugsaði eg. Eitt sekund seinni havi eg lisið meg fram til, at talan er um donsk tøl, og so gevur tað alt nógv betri meining.

Men hví stendur tað so undir innlandstíðindum?

Tá eg fari inn á Kringvarp.fo, trýsti eg altíð beinleiðis yvir á knøttin "Innanlands", soleiðis at eg sorteri lættkeypta portalinspireraða telegrammjournalistikkin og copy-paste journalistikkin frá. Tað, ið Kringvarpið skrivar um uttanlandsviðurskifti er vanliga á so vánaligum støði, at eg tulki tað sum bera ífyllu fyri at fáa eitt sindur av flow á heimasíðuna. Men hetta er sjáldan serliga lesivert, tí eg havi ofta lisið hetta aðrastaðni fyrr. Tað er so einfalt, at Kringvarpið hevur trupult at kappast við útlendskir miðlar um útlendsk tíðindi. Sjálvur lesi eg heldur útlendskar miðlar, um eg vil vita nakað um, hvat hendur kring um í heiminum, tí her eru fólk sett av til bert at fokusera á hesi málini og harvið fáa góðsku og góðar vinklar inn í greinarnar.

### Feskar misvísandi yvirskriftir

Aftur til yvirskriftina. Eg rokni við, at tað var ein hendiligur feilur, at journalisturin legði hesi donsku tíðindi inn undir innanlandstíðindi. Men vánaligar og misvísandi yvirskriftir eru ikki hendiligir feilir, men nakað, ið kemur fyri næstan dagliga. Eg kann nevna nøkur av nýggjastu dømunum av heimasíðuni hjá Kringvarpinum:

- "Njósningin fer ikki at skaða viðurskiftini" (30. juni 2010, Kringvarpið). Hvørja njósning er talan um? Hvørji lond tosa vit um?
- "Krevja 60 milliardir í trygd fyri oljuleiting" (30. juni 2010, Kringvarpið). Hvør krevur trygd fyri oljuleiting? Amerikanarar? Føroyingar? Grønlendingar?
- "Handilsavtala fyri 600 milliardir" (29. juni 2010, Kringvarpið). Hvørji lond hava undirskrivað handilsavtalu? Amerikanarar? Europearar? Kinesarar? Hendan yvirskriftin stendur eisini undir "Innanlands". Enn eitt hendiligt mistak? Í hvussu er en ein kaffiðskeivt-í-hálsin-løta fyri meg, tí við hvønn undirskriva Føroyar eina handilsavtalu fyri 600 miljardir?
- "Skuldsett fyri at hava njósnast fyri Russland" (29. juni 2010, Kringvarpið). Er talan um danir? Bretar? Amerikanarar?
- "Fíggjarætlanin skal skerjast eina helvt" (28. juni 2010, Kringvarpið). Fíggjarætlanin hjá hvørjum? Dønum? Íslendingum? Amerikanarum? Bretlandi? Suðurafrika?
- "Tokvanlukka kravdi 12 mannalív" (24. juni 2010, Kringvarpið). Hvar var hendan vanlukkan? Í India? Í Turkalandi? Í Suðurafrika? Í Spania?
- "Flóttafólk fara ikki heimaftur" (15. juni 2010, Kringvarpið). Hvør hevur hesar trupulleikarnar? Danmark? USA? ES?

Eg vóni, at Kringvarpið í framtíðini fer at gera sær betri ómak við sínum yvirskriftum. Tað hevur stóran týðning fyri eini tíðindi "hvør" hevur gjørt "hvat" við "hvønn", "hvar" og "nær".

### Trupulleikin galdandi fyri føroyska fjølmiðlaheimin sum heild

At enda vil eg viðmerkja, at hetta við vánaligu yvirskriftunum sjálvandi ikki einans er galdandi fyri Kringvarpið. Aðrir miðlar hava eisini misvísandi yvirskriftir. Um hetta er av ósketni ella fyri at lokka fólk til at trýsta seg inn á søgurnar, kann eg bert gita um. Tó meti eg, at Kringvarpið hevur eina serliga ábyrgd at veita tíðindi, ið eru álítandi, soleiðis at fólk ikki – sum eg – noyðast at lesa heimasíðuna við støðugum fyrivarnum.

Eg kann viðmerkja, at tá eg eitt skifti arbeiddi sum journalistur, var tað eitt ósagt krav at levera fangandi yvirskriftir, ið kundu selja. Stundum datt eg sjálvur í ta grøvina at skriva yvirskriftir, ið vóru tambaðar dekan ov nógv í mun til innihaldið. Eg kann ímynda mær, at hetta rationalið í stóran mun er við til at skapa tær misvísandi yvirskriftirnar, ið florera í føroyska miðlalandslagnum í dag.

Ein onnur orsøk til misvísandi yvirskriftir er, at journalistar stytta yvirskriftirnar mest møguligt. Fyrst og fremst tí at vit vita, at nógv fólk ikki orka/tíma at lesa langar setningar, men hjá bløðunum eisini so man kann prenta tær við størri skrift.

Við vón um bata.